## Hetland

Skotski oyggjabólkurin við 32 oyggjum er okkara nærmasti granni fyri sunnan. Umleið 22.000 fólk búgva í Hetlandi, og høvuðsstaður er Lerwick. Oljuídnaðurin hevur stóran týdning fyri Hetland, men hetlendingar hava eisini fingist nógv við fiskiskap. Ferðavinnan hevur fingið alsamt størri týdning fyri búskapin, men tað varð mett sum eitt bakkkast, tá ið Norrøna gavst at sigla til Hetlands. Hetland hevur verið við í Oyggjaleikum síðani byrjanina í 1985. Hetland vann 15 heiðursmerki á Oyggjaleikunum seinast – harav vóru tvær gull.



## St. Helena

Oyggin St. Helena er kend fyri at hava húsa einum kendum fanga fyri nógvum árum síðani. Bretar brúktu oynna sum fangaoyggj, og ein av teimum, sum var sendur á oynna at búgva, var Napoleon. St. Helena hoyrir til Bretland, og á oynni búgva sløk 5.000 fólk. St. Helena liggur har suðuri í Atlantshavinum, og størsti býur er Jamestown. St. Helena vann einki heiðursmerki á Oyggjaleikunum seinast.



# Arbeiðir langsiktað



**Fridolin Bic, sum er nýggjur landsliðsvenjari hjá flogbóltsmonnunum, arbeiðir við at broyta spælistílin og dámar væl at seta sær mál, ið krevja langsiktaða fyrireiking**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

**– Tað hevði kanska verið tryggari at spælt, sum vit hava gjørt fyrr, men upp á longri sikti er tað betri, at vit spæla torførari flogbólt, tí upp á tann mátan fara vit at fáa betri úrslit, sigur landsliðsvenjarin hjá flogbóltsmonnunum, Fridolin Bic**




Hilmar Jan Hansen

Fridolin Bic, sum av síðulinjuni hevur ábyrgdina av manslandsliðnum í flogbólti á Oyggjaleikunum, mundi ikki fyri nøkrum árum hugsa, at hann fór at enda í Føroyum, tí hann er føddur í Rumenia og flutti til Svøríkis sum 10 ára gamal í 1975. Men so fekk hann føroyska konu og hevur nú búð í Føroyum síðstu trý árini.

– Eg byrjaði at spæla flogbólt sum 13 ára gamal, og eg spældi seriøst frá 17 til 23 ára aldur, men gavst rættiliga tíðliga sum virkin spælari. Í staðin gjørdist eg venjari, greiðir hann frá.

– Tilsamans havi eg fingist við flogbóltsvenjing í eini 20 ár, við onkrum lítlum steðgi, og hesi árini havi eg roynt at ment meg, tikið skeið og útbúgvingar. Mítt venjarayrki hevur verið á øllum stigum, bæði kvinnur og menn, og enn tá elitudeildin, sum er besta svenska deildin.

Evnini sum venjari hava tey í Flogbóltssambandinum helst sæð, tí Fridolin Bic hevur vant menninar hjá Fleyr, og hann var til dystin fús, tá heitt var á hann um at taka sær av manslandsliðnum á Oyggjaleikunum á Álandi, sum er fyrsta stóra landsliðsvenjarauppgáva hansara fyri Føroyar.

### Skifti á liðnum

– Eitt skifti er hent á manslandsliðnum, tí vit hava ikki longur teir spælararnar, sum hava verið við í mong ár. Nú skulu teir yngru so læra seg at spæla á hægsta stigi, greiðir Fridolin frá.

## FAKTA

**Hesir manna manslandsliðið í flogbólti á Álandi**

Hans Fróði Jensen, Fleyr
Thorvald Danielsen, Mjølnir
Jóhan Nielsen, ÍF Føroyar
Sune Juul Pedersen, Fleyr
Jón Falkvard, SÍ
Brian Poulsen, ÍF
Hjalmar Joensen, Fleyr
Andras Jógvansson, Fleyr
Høgni Viderø, Fleyr
Jón Joensen, SÍ
Ragnar í Haraldsstovu, SÍ
Bjarki Enni, Fleyr

Venjari: Fridolin Bic

– Størsta broytingin er spælistílurin, sum ger tað eitt sindur torførari. Tað hevði kanska verið tryggari at spælt, sum vit hava gjørt fyrr, men upp á longri sikti er tað betri, at vit spæla torførari flogbólt, tí upp á tann mátan fara vit at fáa betri úrslit.

Samstundis viðgongur landsliðsvenjarin, at manshópurin til Oyggjaleikirnar er nakað tunnur, og tað tók eisini eitt sindur av styrkini, tá Rúni Weihe av persónligum áðum mátti geva avboð og tí heldur ikki hevur verið við í fyrireikingunum síðstu vikurnar.

Mikukvøldið bar eisini so illa á, at Jón Joensen, sum hevur gjørt tað gott til venjing og tikið ábyrgd, fekk ein vøddaskaða, so hann er møguliga ivasamur, nú farið verður til Álands. Men í skrivandi løtu var ikki greitt, um hann fær spælt ella ikki, so nú er at krossa fingrarnar fyri, at skaðin ikki gevur enn eitt avboð.

### Hyggja frameftir

Tá tosið kemur inná, hvat Fridolin Bic væntar sær av hesum Oyggjaleikunum, eftir at menninir fyri tveimum árum síðani vunnu silvur, hevur hann hug at leggja nokk so nógv meira í svarið, enn bara at siga tað stutt og einfalt:

– Vit eiga ongantíð at seta nøkur krøv, tí so hava vit bara alt at missa. Tað síggi eg ofta í Føroyum, at krøv verða sett, men vit eru altso eitt lítið land og hava ikki so nógvir spælarar. Tað hevur nógv størri týdning at virðismeta sigrarnar enn at heingja seg í tapini, heldur hann.

– Nú hava vit ein spælistíl, sum ger, at tú mást skunda tær meira, tí tað gongur skjótari fyri seg á vøllinum. Tá verður vandin fyri feilum sjálvandi størri, men gongsð væl, ber til at býta frá sær ímóti nógvum liðum.

Fridolin vísir ikki minst á, at tað fer at taka tíð at spæla ein nýggjan hevara inn á liðið, har Bárður Mikkelsen hevur spælt í kanska eini 15 ár. Men venjarin trívist væl við at arbeiða langsiktað, so tí vil hann geva hesum ta tíð, sum krevst.

– Málið hjá okkum er, at vit skulu spæla væl, tí spæla vit væl, koma vit í finaluna. Vit vinna ikki, tí vit vinna, men tí vit spæla væl, sigur Fridolin Bic, ið heldur flogbóltin hjá bæði kvinnum og monnum vera á rættari leið, nú arbeitt verður frameftir og við broytingum, ið kunnu taka tíð.

– Eg síggi, at munur er bæði í landskappingini og hjá kvinnunum, so tað er nógv, ið broytist rætta vegin. Her eru evnaríkir spælarar, men tað tekur tíð at fáa úrslit, og tað skal gerast upp á longri sikti, skal nakað virði verða í tí.